

Vága kommuna vil sleppa at byggja nýggjan skúla á Giljanesi, tí verandi skúli er so illa farin av soppi

# Dregur út við nýggjum skúla

## Vága kommuna ótolnast eftir at fáa loyvi at byggja nýggjan skúla á Giljanesi

Randi Jacobsen

Á mikkjalsmessu søkti Vága kommuna um loyvi at taka skulan á Giljanesi niður fyri at byggja nýggjan skúla á staðnum. Orsøkin er, at skúlin er fongdur við soppi.

Albert Ellefsen, borgarstjóri í Vága kommunu er farin at ótolnast eftir svari frá Mentamálaráðnum.

Hann ber ótta fyri, at svarið dregur út, tí avgerðin verður tengd at framtíðar samstarvi millum skúlar. Hetta byggir hann á, at 23. november hevði kommunan fund við Mentamálaráðið, og á tí fundinum spurdi Helena Dam á Neystabø, hvat Vága kommuna segði til at fara í sjálvboðið skúlasamstarv við Sørvágs kommunu.

Slíkt skúlasamstarv stendur ikki ovast á skránni hjá teimum báðum kommununum í Vágum.

Ein partur av skúlanum á Giljanesi er stongdur orsakað av soppi. Nakrir flokkar ganga tí í Miðvági, nakrir í Sandavagi, og tveir flokkar ahalda til á kommunuskrivstovuni.

### Barnatalið veksur

- Tað er keðiligt, at vit ikki fáa svar, tí trupult verður at loysa skúlaviðurskiftini næsta ár, við tað at vit vænta at hava ein flokk aftrat næsta skúlaár. Barnatalið er so nógv vaksið seinastu árini, sigur Albert Ellefsen.

Umframt loyvi frá Mentamálaráðnum skal kommunan hava loyvi frá Fíggjarmálaráðnum til at taka lán.

Skúlin kann væntandi standa liðugur tvey ár eftir, at loyvini eru komin í hús.



Einki er sum at sveima uppi í luftini og stýra sjálv, heldur Hansa Poulina

# DREYMURIN ER AT FLÚGVA AIRBUS

## Mikudagin tók Hansa Poulina Adriansdóttir prógv sum flogskipari. Frá tí hon var smágenta, hevur hon ætlað sær hesa útbúgvingina

Randi Jacobsen

Mikudagin fekk ein næmingur á Billund Flyveskole prógv sum flogskipari.

Hesin næmingur var Hansa Poulina Adriansdóttir, sum er úr Klaksvík, men býr í Danmark.

- Eg haldi, eg var bara fýra ára gomul, tá eg fór at hyggja, hvørja ferð eg sá eitt flogfar. Og eg havi altíð ætlað mær at farið henda vegin, sigur Hansa Poulina.

Tað dragandi við starvinum er at vera høgt uppi í luftini, síggja niður yvir landslagið og stýra flogfarinum sjálv.

Útbúgvingin tekur tvey ár, men Hansa Poulina byrjaði á einum øðrum flúgviskúla, sm fór av knóranum. Tá hon so valdi at halda fram á skúlanum í Billund, noyddist hon at taka ein part umaftur, og tí hevur hon brúkt stívliga trý ár til útbúgvingina.

### Kostar nógv

- Tað er ein ógvuliga dýr útbúgving, men hon er pengarnar verd fyri meg, sigur Hansa Poulina.

600.000 krónur hevur útbúgvingin kostað henni. Næsta ár fer kostnaðurin upp á einum 700.000 krónur.

Næmingarnir fáa víðkaðan lestarstuðul, millum 5.000 og 6.000 krónur.

Fráfaringarroyndin er bæi teoretisk og praktisk.

Hansa Poulina sigur, at tá ið hon var til teoretisku royndina, fekk hon spurningar frá einum instruktøri og eitt umboð fyri Statens Luftfartsvæsen var eisini við.

Praktiska royndin mikudagin var at flúgva eitt lítið flogfarð yvir Danmark, og á túrinum fekk hon ymsar uppgávur at loysa. Trupulleikar, sum flogskiparar kunnu koma út fyri.

### Leitar eftir starvi

Hansa Poulina Adriansdóttir veit enn ikki, hvussu framtíð hennara sum flogskipari sær út.

Fyrst fer hon at leita á netinum og ringja til onkran, sum kennir onkran, sum kennir onkran fyri at leita eftir starvi.

- Í høvuðsheitum kann eg flúgva øll flogfør, men tá ið eg havi fingið eitt starv, skal eg hava meira venjing í eitt flúgva ávísa flogfarið, sigur Hansa Poulina.

Stóri dreymur hennara er at sleppa at flúgva ein airbus.



Mikudagin kom hon á mál og tók prógv sum flogskipari